inni - trygt og ómaksleyst til hús



## Stásilig sethús – Velbastaðv. 33, Tórshavn

Húsini eru í 3 hæddum - 2 á 114 og 1 á 70 - í alt 298 fermetrar. Grundøkið er 720 fermetrar. Byggiár: 1977. Húsini eru dagførd, so tey nú eru sum nýggj, og talan er um eini sera snøgg og stásilig hús. Í miðhæddini er hjallur, inngongd, durur, hall / garderoba, goymslurúm, hjúnarrúm, baðirúm, matarkøkur, borðsstova / alrúm / stova og sjónvarpsstova við útgongd til terassu. Í erva er trappurúm / alrúm / arbeiðsrúm, hjúnarrúm við baðirúmi, goymslurúm og stova við útgongd til altan. Í neðra er inngongd, vaskirúm / fýrrúm, 2 stór kjallararúm við egnari ingongd, ið lættliga kunnu innrættast til íbúð, og garaga. Húsini standa í barnavinaligum, veðurgóðum og náttúruvøkrum umhvørvi við góðum útsýni. Sera vakur og hugnaligur garður / urtagarður er runt húsini. Stutt er til barnagarð og busssamband. Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.



## Stór sethús – Ósabakkavegur 2, Kollafjørður

Húsini eru í 2 hæddum 186 fermetrar hvør - í alt 372 umframt eitt óinnrættað loft. Grundøki er 1485 fermetrar. Byggiár: upprunaliga 1950-60'unum, uppíbygd í 1980'unum. Húsini eru høvuðsumvæld innan í 2006 har køkur, hvítvørur, øll gólv, innveggir, loft og nøkur vindeygu eru skift. Eisini er ein partur av takinum skift. Húsini eru nýmáløð innan og uttan. Í erva er durur, 2 gongir, køkur, stova, 2 baðirúm og 4 kømur. Í neðra er sjálvstøðug íbúð. Har er durur, gongd, køkur, stova, kamar, baðirúm, fýrrúm / vaskirúm, kjallararúm og 2 goymslurúm. Harafturat er bilhús við lofti á uml. 55 fermetrar. Húsini verða seld um hóskandi boð fæst.



## Sethús – Heygavegur 4, Klaksvík

Húsini eru í 3.hæddum - samla búðvídd uml. 126 fermetrar. Grundøkið er 385 fermetrar. Byggiár: 1950'ini. Í ovastu hædd eru 4 kømur, gongd og baðirúm. Í miðhæddini eru gongd, køkur, 2 stovur og trappuniðurgongd. Eisini er hjallur. Í niðastu hædd er kjallararúm / fýrrúm. Tilfar til umvæling av øllum húsinum er við í søluprísinum. Har er m.a. stáltak, mahognivindeygu, timburklædningur og bjálving. Húsini standa mitt í býnum beint við skúlar, handlar, ítróttarøkið og svimjihøllina. Prísuppskot: kr. 1.300.000,00.



## Stór sethús – Lynggøta 5, Tórshavn

Stóru sethúsini eru í 3 hæddum. Niðastu eru á 138 fermetrar og ovasta á uml. 100 - í alt 376 fermetrar. Grundøkið er 436 fermetrar. Byggiár 1967, men húsini eru so við og við dagførd, so tey nú eru í sera góðum standi. M.a. eru flestu vindeygu skift, takið skift í 2006 og ketil og oljufýr í 2004. Í miðhæddini er inngongd, durur, gongd / hall, baðirúm, hjúnarkamar, stórt kamar / stova, borðsstova / stova, millumgongd / bryggers við egnari inngongd og hjallur. Í neðra er inngongd, bryggers / fýrrúm, gongd, baðirúm, wc, køkur, stova, hjúnarrúm, 2 kømur, goymslurúm og trappurúm. Í ovastu hædd er trappugongd / gongd, kamar, baðirúm og stórt loftsrúm. Hartil er bilskúrur. Húsini standa sera væl fyri mitt í Havn í veðurgóðum og friðarligum umhvørvi og hava panoramaútsýni yvir alla Havnina. Garður / urtagarður við terassu og góðum sólargangi er runt húsini. Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.



## Sethús – Ovari Vegur 40, Leynar

Húsini eru í 2 hæddum - samlað búvídd er 220 fermetrar umframt ein garaga á 27 fermetrar. Byggiár 1988. Grundøkið er 575 fermetrar. Húsini eru arkitektteknað og sera búvinarlig ("anvendelig") Tey eru orkusparandi, hava flagtak, hitapumpu umframt miðstøðuhita. Í ovaru hædd er køkur / borðstova, grovkøkur, stór stova, hjúnarúm, gongd, baðrúm, klædnarúm og hjallur. Í niðaru hædd er durur, fýrrúm, 3 kømur, gongd, baðrúm og kjallararúm. Húsini eru sera snotilig, standa í barnavinarligum, hugnligum umhvørvið og hava gott útsýni út á sjógv, og bert 20 minuttir eru til Havnar. Húsini verða seld um hóskandi boð fæst.



## Sethús – Vágsvegur 84, Vágur

Húsini eru í 2 hæddum hvør á uml. 140 fermetrar - í alt 280 fermetrar. Grundøkið er 196 fermetrar. Byggiár: 1911. Í neðra er inngongd, gongd, køkur, stova, kamar, nýtt baðirúm, arbeiðsrúm og fýrrúm. Í erva er trappugongd, 3 kømur, baðirúm, goymslurúm, arbeiðshølir, gongd og altan. Húsini standa miðskeiðis í býnum í veðurgoðum umhvørvi. Prísuppskot: kr. 350.000,00.



## Íbúð – Vesturgøta 11, Tórshavn

Íbúðin, ið er 63 fermetrar, liggur á ovastu hædd. Byggiár: 1986. Har er inngongd, gongd, baðirúm, køkur / stova og 2 kømur. Harafturat er 22 fermetrar stórt goymslurúm í kjallara. Íbúðin er væl hildin og í góðum standi. Har er ventilatiónskipan, felags parabolskipan, breiðband og góð parkeringsviðurskifti. Sera gott útsýni er yvir Nólsoyarfjørð. Íbúðin verður seld um hóskandi boð fæst.



## Sethús – á Brúgv 7, Fuglafjørður

Húsini eru í 3 hæddum - samlað búvídd uml 224 fermetrar. Hartil er ein hjallur / hoyggjhús / seyahús. Grundøkið er 754 fermetrar. Byggiár: 1959. Í miðhæddini er gongd, gestawc, køkur, kovi, 2 stovur og kamar. Í ovastu hædd er gongd, baðirúm, 4 kømur og altan. Í niðastu hædd er gongd, 2 kømur, vaskirúm, fýrrúm og kjallararúm. Stórt stykki er vestanfyri húsini og urtagarður við trøðum er niðanfyri. Húsini, sum standa væl fyri mitt í bygdini, verða seld, um hóskandi boð fæst




## Trøð – Longubrekka, Sørvágur

Ognin er ein rættiliga stór trøð beint omanfyri byggiøki á Longubrekku í Sørvági. Trøðin liggur sera væl fyri við veg og er løtt at kkoma til. Trøðin liggur í náttúruvøkrum umhvørvi og hevur avbera vakurt útsýni oman yvir bygdina. Trøðin verður seld, um hóskandi boð fæst.



## Summarhús - Gjáarvegur 5, Gjógv

Húsini eru í 2 hæddum umframt ein lágur kjallari og ein hjallur. Húsini eru bygd í 1800 talinum. Grundøkið er 196 fermetrar. Í miðhæddin sum er 35 fermetrar er gongd, baðirúm, køkur og 2 stovur. Í ovari hæddini sum er uml. 21 fermetrar eru 2 kømur. Í niðastu hæddini er kjallararúm/- fýrrúm. Húsini standa mitt í bygdini beint við ánna í sera hugnarligum umhvørvi. Góð parkeringsviðurskifti er við húsini. Húsini verða seld um hóskandi boð fæst.



## Sethús – Garðagøta 7, Miðvágur

Húsini eru í 2 hæddum hvør á 100 fermetrar - í alt 200 fermetrar. Grundøkið er 453 fermetrar. Byggiár: 1969: Húsini eru dagførd so við og við. Í erva er terassa, inngongd, gongd / garderoba, matarkøkur, stova, hjúnarrúm, baðirúm, 2 kømur og goymslurúm / kovi. Í neðra er inngongd, durur / gongd, kamar, vaskirúm / kjallararúm, goymslurúm / fýrrúm og goymslurúm. Harafturat er hjallur á uml. 5 m2. Húsini standa í veðurgóðum, friðarligum og barnavinaligum umhvørvi við góðum útsýni og garður / urtagarður er runt húsini. Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.



## Sethús – Varðabú 18, Tórshavn

Húsini eru í 2 hæddum - samlað búvídd uml. 180 fermetrar. Grundøkið er 431 fermetrar. Byggiár uml. 1950. Húsini eru høvuðsumvæld í 1990'unum har m.a. vindeyguni, tak, oljufýr og baðirúmini eru gjørd av nýggjum. Annars eru húsini dagførd og sera væl hildin. Í erva er køkur við spísikróki, 3 stovur, wc, gongd og altan. Í neðra er gongd, 2 kømur, hjúnarrúm við baðirúm, vaskirúm, klæðnarúm, fýrrúm og baðirúm. Hartil er ein amboðsskúrur. Húsini standa væl fyri við endaveg og hava góðar parkeringsmøguleikar. Møguleiki er fyri at byggja uppí húsini, og tekningar fylgja við.

## Í Støðlunum, 825 Froba

Húsini eru í trimum hæddum, hvør uml. 84 fermetrar, alt innrættað. Grundøkið er 994 fermetrar. Á loftinum eru 2 kømur, baðirúm, gongd og altan. Í miðhæddini eru køkur, stova, 2 kømur, baðirúm, gongd og altan. Í niðastu hædd eru kamar, 2 gangir, vaski-/fýrrúm og hjallur. Húsini standa í barnavinarligum, friðarligum umhvørvi og hava sera gott útsýni yvir fjørðin. Byggiár: 1978.

Sosialurin 341800

P/F inni • Niels Finsens Gøta 37
P.O. Box 364 • FO-110 Tórshavn
inni@inni.fo • Tlf. 35 42 00 • Fax 35 42 01

inni